# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

**Føðingar**

15. juni fingu Rannvá Debens Christiansen og Dánial Olsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 47 cm. long og vigaði 2150 gr.

16. juni fingu Katrin Nielsen og Karsten Hansen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3300 gr.

21. juni fingu Lydia og Janus Joensen, Klaksvík, ein son. Hann var 47 cm. langur og vigaði 2815 gr.

22. juni fingu Borgny Mohr Nielsen og Kári Rubek Nielsen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3420 gr.

22. juni fingu Oddvør Ottosen og Martin Wilhelmsen, Haldórsvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3850 gr.

23. juni fingu Gunnvá Gray og Ransin Napoleon Djurhuus, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3100 gr.

23. juni fingu Kirstin Danielsen og Rúni Hansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3250 gr.

23. juni fingu Åshild Johansen, Norra og Ragnar H. Jacobsen, Nólsoy ein son, og Annika bleiv stórasystir. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3830 gr.

23. juni fingu Siri og Torkil Mørkøre, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 48 cm. long og vigaði 2205 gr.

24. juni fingu Judith og Jørgin Thomsen, Skáli, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3750 gr.

25. juni fingu Kristvør og Eivind Koldsen, Skopun, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3780 gr.

26. juni fingu Elsa Maria og Jógvan í Beiti, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3600 gr.

28. juni fingu Gunn og Rói Dahl-Jacobsen, Kaldbak, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3900 gr.

29. juni fingu Marian á Borg og Bogi Midjord, Hoyvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4000 gr.

**Brúdleyp**

1. juli giftast Jacobina Norðberg Petersen og Martin André Assentoft í Sankt Markus kirkjuni á Frederiksberg. Brúdleypsadr.: Frodesvej 28, 2880 Bagsværd.

Leygardagin 1. juli kl. 13.00 giftast í Havnar kirkju Tórunn Sjóvará Poulsen, Tórshavn og Øssur Joensen, Skopun. Døgurði verður á Hotel Hafnia fyri innbodnum. Kl. 19.00 verður opið hús í Gortrugøtu 26, 188 Hoyvík.

Leygardagin 1. juli kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Elly Ejdesgaard Joensen, Tórshavn og Andreas Petur Hansen, Skáli. Veitslan verður í Pálsstovu fyri innbodnum.

Leygardagin 1. juli kl. 14.00 giftast í Betania í Porkeri Beinta Gudfinnsdóttir Olsen úr Porkeri og Edvard Johannus Jacobsen av Eiði. Veitsla verður fyri innbodnum.

Leygardagin 1. juli kl. 14.00 giftast í Horsens Pinsekirke Heidi Jensen, Århus og Christian Laursen, Silkeborg. Adr.: Hvedevænget 4, 8600 Silkeborg.

**Prógv**

Erla Heinesen Højsted, Hoyvík, búsitandi á Frederiksberg, hevur frá Universitetinum í Keypmannahavn lokið prógv sum sálarfrøðingur.

Heidi Friang Cruse úr Fuglafirði hevur fingið prógv sum lærari á Ålborg Seminarium.

## Hjørleif Hentze 80 ár

Mánadagin 3. juli 2006 verður Hjørleif Hentze, fyrrv. verkførari, Marknagilsvegur 48, Tórshavn 80 ár.

Ljósu barnaárini hevði Hjørleif undir góðum umstøðum heima á Sandi. Foreldrini vóru Kristianna og Jóan Petur Hentze, 3 vóru børnini, Tórbjørn (1921-2001), hann búsettist á Argjum, Ása (1923-2005) og Hjørleif, sum búsettust í Havn.

Tá skúlagongdin hjá Hjørleifi var frá hondini, var hann ikki 14 ár, men hugurin til virkis hevði hann altíð havt og sum hjá ungum bygdadreingi tá, fór hann upp í alt vanligt arbeiði, sum tá var í bygdini.

Jørðina vóru øll felags um at røkja og útróður var eisini ein partur av gerandisdegnum hjá Hjørleif, og síðstu krígsárini fer hann til skips. Hann er við "Norðsteini", "Álaker" og "Trý Systkin", kend sluppnøvn.

Men 6. november 1946 skiftir hann kós, hann er nú 20 ára gamal og fer í smiðjulæru hjá Wenzel Petersen, smiðjumeistara í Havn. Eitt summar fyrst í 1950-árunum var hann í Grønlandi, Wenzel hevði smiðju í Føroyingahavnini. Hjørleif var hjá Wenzel Petersen í samfull 30 ár.



Tá hann í 1946 fór í læru, helt smiðjan til í nýgjørdum hølum í Varðagøtu, har kommunala brandstøðin seinni var, Wenzel flutti seinni smiðjuna í gróthúsini hjá Pola í Dali á Eystaru bryggju, hagani var smiðjan uppaftur einaferð flutt út í Bakka, har Wenzel bygdi nýggja smiðju. Hjørleif var verkførari hjá Wensel, og tá nýmótans bilsmiðjan uppi undir Krákugjógv varð bygd, var Hjørleif við til byggingina.

Í 1976 fer Hjørlef at starvast hjá fyritøkuni Demich, sum var á Tinghúsvegnum í Havn og hevði stóran handil við sanitetsvørum.

Hjørleif verður nevndarlimur í Handverksmeistarafelagnum í 1970, verður nevndarformaður í 1973-81. Síðani er hann skrivari felagsins, til hann í1992 gevst fyri aldur. Stýrislimur í Tórshavnar Tekniska Skúla1973-1992.

Hjørleif var sera virkin í losjuni Skorðatindi, áðrenn hann fór í smiðjulæru í Havn. Valafólk hevði hann undir lið í losjuni. Móðirin Kristianna, hon var ein losjustovnarin í 1930, Mortan í Skálanum, Johan í Skemmuni, Steingrim hjá Kitti og fleiri aðrir felagsstuðlar áttu eisini at verið nevndir. Vitnisburður frá livandi virkseminum, ið tá varð í losjuni, eru hondskrivaðu bøkurnar, sum skiftu millum skrivandi limirnar. Úr bókini lósu tey søgur sum annan fyrndarmiklan lesna. Mentanaræðrar frá hesum fólkum nemur tú hjá Hjørleifi. Um gerðabøkur Sandslosjunar kundu tala, var Hjørleif eyðsýndur. Seinni er Hjørleif við hugsanum sínum – í "Glaðustroki".

Eitt kapitul fyri seg er felagsmaðurin Hjørleif í losjuni "Støt Viljen". Knáur hevur hann verið, tá mál um húsaviðurskiti felagsins vóru at greiða, hollur í øllum.

Una og Hjørleif giftust 6. november 1955 og tey settu búgv á Marknagilsvegnum – her hava tey verið síðani. Rundan um seg hava tey dóttrina Sólrun og hennara Eyðstein við børnunum Unu Cesiliu, Beintu Birgittu og Hjørleivi.

Tillukku við kempualdrinum – sjálvan dagin eru tey heima á Sandi.

**jl**

## Las í Kairo og fermd á Argjum

**14 ára gamla argjagentan Gyðja á Argjahøvda veit hvat tað er at búgva í Asien og Afrika. Men fermast, tað vildi hon heima í Føroyum.**

UNGDÓMUR
*Snorri Brend*

**Argir:** Seinasti sunnudagur var ein serstakur dagur í lívinum hjá teirri ungu Gyðju.

Eftir at hava gingið til prest í egyptiska høvuðsstaðnum eitt skifti, var dagurin nú komin har hon skuldi fermast í Argja kirkju av sóknarprestinum Bergi D. Joensen.

Frálæran var saman við einum øðrum donskum drongi hjá einum donskum presti, men samband var eisini til føroyska prestin umvegis alnetið.

– Vit vildu mest hava at vita, hvat eg skuldi læra. Jú, hetta var ein øðrvísi ferming enn hjá øðrum, greiðir Gyðja frá.

Frammanundan fermingini var hon tveir dagar saman



*Bergur D. Joensen stóð fyri fermingini hjá Gyðju í Argja kirkju*

við Bergi, har greitt varð frá tí seinasta viðvíkjandi ferming hennara.

**Spurningar frá muslimum**

Í Kairo gongur Gyðja í eitt amerikanskum skúla, hagar næmingar koma úr øllum heiminum.

– Eg havi eisini fleiri egyptiskar vinkonur, sigur Gyðja.

Tær hugna sær saman á ymiskan hátt, m.a. við at lurta eftir tónleiki og práta. Eitt av evnunum var tann komandi fermingin.

Vinkonurnar vóru sum vera man áhugaðar í, hvat fermingin var og hvussu tað gekk fyri seg í Føroyum.

Hesar vinkonurnar eru sjálvandi vaksnar upp í einum muslimskum umhvørvi, og vildu tí eisini vita, hví hon skuldi fermast.

– Eg royndi bara at svara teimum sum frægast, sigur nýfermda argjagentan við altjóða bakgrund.

**Gott við Arto**

Hetta at búgva í fremmandum landi er ikki ókent fyri Gyðju. Hon hevur m.a. búð trý ár í Nepal og hevur seinastu tvey árini búð í Egyptalandi.

Mong vilja helst halda, at tá ein býr í einum slíkum arabiskum og muslimskum landi er bæði ófriðarligt og helst eisini vandamikið hjá útlendingum.

Men tað kennir Gyðja einki til:

– Nei, her í Egyptalandi er hvørki ótrygt ella vandamikið, sigur hon.

Hóast stóru fjarstøðuna hevur hon kortini megnað at hildið sambandið viðlíka við vinkonur sínar í Føroyum.

– Her gera vit brúk av Arto. Tað er gott at hava henda møguleikan, sigur Gyðja.